## Vilja hava evruna

Tað hevði verið ein fyrimunur fyri íslendskt vinnulív og fyri samfelagið sum heild, um landið fekk sær evruna sum gjaldoyra ístaðin fyri íslendsku krónuna. Tað kom fram, tá íslendska vinnutingið varð sett í gjár. Í setanarrøðuni segði formaðurin í Vinnuráðnum, Erlendur Hjaltason, at tveir triðingar av vinnulívsleiðarunum eru fyri at seta evruna í gildi sum íslendskt gjaldoyra. Hinvegin eru tveir triðingar eisini ímóti limaskapi í ES, legði hann afturat.



# Missur koyrikortið fyri vandamikla koyring

**Tvær ferðir upp á stutta tíð vísti ein ungur maður stórt fyrilitarloysi og so groft óansni, at hann nú hann missur koyrikortið**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hetta vegastrekkið rópar til himmals um treytaleysa víkiskyldu, tí her her bæði ávaringartrýkantur og hávatenn. Kortini rendi ein ungur maður beint útfyri ein bil, sum kom koyrandi eftir høvuðsvegnum. Hann hevði eisini eina skilaleysa yvirháling og tilsamans kostaði tað honum koyrikortið*

Hastverk er lastverk.

Tað mátti ein ungur bilførari ásanna í Føroya Rætti í gjár.

Hann varð ákærdur fyri í tveimum førum at hava skúgvað ferðslutrygdina til viks og enntá at hava víst stórt fyrilitarloysi og groft óansni.

Tilsamans metti dómarin hetta verða so álvarsligt, at hann tók koyrikortið frá manninum í eitt hálvt ár og gav honum harafturat 3000 krónur í bót.

Og hetta var akkurát tann revsingin, sum ákærin hevði kravt.

Onnur ákæran var torfør hjá manninum at nokta seg sekan í, tí har hendi ein samanstoytur, sum hann ikki fekk tosa seg frá.

Tað hendi úti á Argjum, tá ið hann ikki helt treytaleysa víkiskyldu, men koyrdi út á høvuðsvegin uttan at ansa eftir, at ein bilur var fyri.

Tá ið maðurin skuldi snara út á høvuðsvegin steðgaði hann við hávatennirnar og læt nakrar bilar bilar fara framvið.

Men so kom ein bussur og tá ið hann var farin framvið, koyrdi hann út á høvuðsvegin, uttan at ansa eftir, at ein persónbilur kom beint aftan á bussinum.

Bilurin, sum kom eftir høvuðsvegnum, varð raktur aftaliga í høgru síðu og stoyturin var so harður, at hann snaraði 180 stig á vegnum og vendi sostatt øvugtan veg, tá ið hann steðgaði.

Tann ákærdi royndi eftir besta førimuni at greiða rættinum frá um blindar vinklar og at bussurin hevði tikið útsýnið frá honum, tí ansaði hann ikki eftir bilinum ið kom beint aftaná bussin. Men hetta fekk ikki dómaran at blotna, tí hann staðfesti, at bilførarin hevði rætt og slætt skyldu til at bíða við hávatenninar til hann var púra vísur í, at ongin vandi stóðst av at koyra út á høvuðsvegin.

### Skilaleys yvirháling

Hin ákærin snúði seg um eina skilaleysa yvirháling á Eystara Ringvegi í Havn.

Hann var á veg niðan eftir Ringvegnum, tá ið hann yvirhálaði ein bil á leið við krossin við Hvítanesvegin.

Ì sambandi við yvirhálingingina koyrdi hann langt út á sperrufeltið og tað gjørdi tað ikki frægari, at ein fótgangarateigur var beint við.

Ein bilur kom ímóti honum omaneftir Ringvegnum og tá ið tað so vísti seg, at talan var um ein sivilan politibil á patrulju, fall hamarin.

Politisturin greiddi frá, at hann hevði verið noyddur at bremsa hart fyri at sleppa undan samanstoytinum, tá ið tann ákærdi yvirhálaði.

- Hevði eg ikki verið óvanliga eftiransin og varin, hevði tað brostið, greiddi politisturin frá í rættinum.

Politisturin metti eisini, at ferðin hevði verið væl yvir teir loyvdu 50 kilometrarnar um tíman, tá ið hann yvirhálaði.

Sjálvur helt tann ákærdi ikki, at vandi var á ferð, men tað vóru hvørki ákærarin ella dómarin samdir í.

Hann varð sostatt dømdur fyri skilaleysa yvirháling.

Tann ákærdi hevði onga forklåring upp á, hví tað so avgjørt var neyðugt at yvirhála, uttan tað, at hann skuldi skunda sær í ein handil at keypa - men hetta var mitt á degi og tað vóru fleiri tímar til handilin lukkaði.

Bæði ákærin og dómarin vóru samdir í, at talan var um eina skilaleysa yvirháling, har bilførarin hevði sett ferðslutrygdina í vanda við stórum fyrilitarloysi.

Tann ákærdi fer nú at taka støðu til um dómurin skal skjótast inn fyri landsrættin.

# Løgreglan klipt í koyrikortið hjá 11 bilførarum

**Síðani skipanin at klippa í koyrikortið, kom í gildi á nýggjárinum hevur løgreglan klipt 11 koyrikort. Nógv tey flestu klippini eru givin fyri at lata børn sita leys í bili, sigur løgreglumaður við tíðindini hjá Rás2**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Síðani skipanin at klippa í koyrikortið hjá bilførarum fyri ávís brot á ferðslulógina, kom á nýggjárinum, hevur løgreglan klipt í koyrikortið hjá 11 bilførarum.

Tað segði Eyðun Berg, løgreglumaður, í tíðindunum á Rás2 í gjár.

Hann segði, at meiri enn ein triðingur av øllum teimum, sum hava fingið eitt klipp í koyrikortið, hava fingið tað fyri at hava børn í bilinum, uttan at tey hava verið spent í trygdarbelti.

Higartil hava nevniliga fýra bilførarar fingið klipp í kortið fyri at hava børn í bilinum, uttan at tey hava sitið í trygdarbelti.

Eyðun Berg staðfesti fyri Rás2, at somuleiðis hava fýra bilførarar fingið klipp í koyrikortið fyri at yvirhála, har miðstrikan hevur verið óbrotin.

Hinvegin hava tveir bilførarar fingið klipp í koyrikortið fyri at hava koyrt fyri reyðum ljósi og ein hevur fingið klipp fyri at hava brotið víkuskyldina.

Tølini eru gjørd upp hálvan februar og tey byggja á frágreiðingarnar, sum higartil eru skrivaðar og tað merkir, at tað kunnu liggja onnur mál, sum enn ikki eru skrásett, men sum eisini fara at føra við sær, at koyrikort verða klipt.

### Undrar løgregluna

Eyðun Berg var við til at fyrireika skipanina við klippikortunum og hann sigur, at tað kemur óvart á løgregluna, at tað framvegis eru fólk, sum hava børn í bilinum, sum ikki sita í trygdarbelti.

- Tað undrar meg, at fólk framvegis ikki eru meiri tilvitað um, hvussu vandamikið tað er at hava børn sitandi leys í bilinum, segði hann við Rás2.

Hann heldur, at her krevst ein hugburðsbroyting og tað er eisini ein spurningur um at venja børnini til at sita í trygdarbelti, tá ið tey eru í bili.

Hinvegin undrar tað hann ikki nakað serligt, at tað verður klipt í koyrikortini fyri yvirhálingar og fyri at koyra fyri reyðum ljósi.

Hetta eru trupulleikar, sum altíð hava verið og hann heldur, at tað er óhugsandi, at hesi brotini skulu hvørva heilt, bara tí ein slík skipan er sett í gildið.

Men løgreglumaðurin heldur ikki, at 11 klipp í hálvan annan mánað, er eitt órógvandi høgt tal, men hevði løgreglan havt orku til fleiri kanningar, hevði talið helst verið væl hægri.

Men hann heldur kortini eisini, at ferðslumynstrið er broytt, síðani skipanin er komin í gildið, tí fólk eru farin at ansa betri eftir og at koyra spakiligari.

Hinvegin vísa royndir aðrastaðni, at tá ið ein tíð er fráliðin, hevur ferðslan lyndi til at detta aftur í tað gamla mynstrið.

- Endamálið við skipanini er at raka tey, sum aftur og aftur bróta ferðslulógina og øll tey, sum halda reglarnar verða ikki nervað av klippikortsskipanini, segði Eyðun Berg í tíðindunum á Rás2.